Fiat 110 ár

Fiat Bravo árgang 2009

Hesin er tann fyrsti FIAT árgang 1899 við 679 cc motori við 4,2 hk

Tann 11. juli í ár vóru 110 ár liðin síðan Giovanni Agnelli stovnaði verksmiðjuna Fabbrica Italiana Automobili Torino (FIAT) í Torino í 1899.

Fiat gjørdist ein av heimsins størstu bilkonsernum. So gott sum øll bilmerkini í Italia hoyra í dag til Fiat Group. Umframt Fiat eru tað Ferrari, Maserati, Lancia, Iveco, Abarth og Alfa Romeo.

Umframt tað samstarva Fiat við nógvar bilverksmiðjur kring um í heiminum um t.d. motorar, teknologi og felags bilmodell.

mg

MC-Sølan umboðar nú Triumph

MC-Sølan umboðar nú eisini ensku Triumph motorsúkklurnar í Føroyum

Fyrr í vikuni var svenski Niclas Persson frá Triumph Motorcycles AB í Føroyum og gjørdi sáttmála við Anders Berg frá MC-Søluni. Høvuðssætið hjá Triumph fyri Skandinavia er í Svøríki.

Umframt Triumph umboðar MC-Sølan motorsúkklumerkini Suzuki, Kawasaki og Ducati, eins og Piaggio og PGO skutarar. Triumph motorsúkklurnar eru ikki ókendar í Føroyum. Tær hava verið umboðaðar av t.d. Gunnari Hansen, ið eisini seldi DKW, NSU og Mercedes, og av Charles Mauritzen, sum seldi Austin bilarnar. Hetta hevur verið í 50- og 60-unum.

Triumph er ein av elstu motorsúkkluverksmiðjunum í heiminum. Verksmiðjan var stovnað sum súkkluverksmiðja í 1884, og framleiðslan av motorsúkklum byrjaði í 1902. Tað gongur væl hjá Triumph. Ongantíð í søguni eru so nógvar Triumph motorsúkklur seldar sum í 2008, tá umsetningurin vaks við 29 prosentum í mun til árið fyri.

mg

Niclas Persson frá Triumph Motorcycles AB og Anders Berg frá MC-Søluni
Mynd: Jens Kristian Vang